# TILTØK

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Ólavur Jacobsen talar.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygardagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Sang- og vitnimøti við luttøku av Streingjakórinum. Innsavnan til húsið.

**Kedron, Sørvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Breyðbróting. Sunnudagsskúli fyri øll børn verður í kjallaranum kl. 11.30. Evangel. møti verður kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Um viðrar verður farið til Gásadals frá missiónshúsinum. Kl. 18.00 Møti við Onnu av Kák.

**Kollafjørður - Missiónhúsið**
Útimøti leygarkvøldið kl. 21.00.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Miktam.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti.
Bønarmøti verður í Haldórsvík mikukvøldið 14. juni kl. 20.00 og útimøti í Haldórsvík mikukvøldið 14. juni kl. 21.00.

**Saron, Haldórsvík**
Bønarmøti verður í Haldórsvík mikukvøldið kl. 20.00 og útimøti í Haldórsvík mikukvøldið kl. 21.00.

**Haldórsvík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 við luttøku úr Meinigheitshúsinum í Havn. Øll eru vælkomin.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Møti sunnukvøldið kl. 19.00 við Sigurd Sørensen.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Paula Høj.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagin kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17.00 Familjumøti v/ Jóannes Johannesen, Klaksvík.
Náttúrði verður aftaná.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti, har Reimund Langgaard talar um evnið »Tey líðandi kristnu«.

**Siloa, Fuglafirði**
Á fundunum sunnudagin 11. juni kl. 11.00 og 18.00 talar Jógvan Páll Sevdal. Evni: Heim okkara. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Andras Biskopstø og fleiri, kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18.00 Møti við Hjørleif Poulsen, kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn og kl. 21.00 Ungdómsróp.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við sunnudagsskúla. Moldova-toymi luttekur á møtinum. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er Morgunmøti.

**Kalsoy**
Møti verður í Bygdarhúsinum á Húsum leygarkvøldið kl. 20.00 og í Mikladals kirkju sunnudagin kl. 17.00 við Jákup Olsen og Fischer Johannesen. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.

**Aglow, Sandoy**
Aglow møti verður í Samljóð leygarkvøldið kl. 19.00 við vitjan av Skálafjørðinum. Kvinnur og menn eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli vegna legu í Nesvík. Sunnukvøldið kl. 18.00 verður Møti við Tove og John Hammer.

**Missiónshúsið í Vági**
Onki møti sunnukvøldið vegna vikuskiftismøtir í Sumba.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Magnus Jensen talar. Øll eru vælkomin.

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Vikuskiftismøtir verða fríggakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00.
Hóskvøldið er húsmøti hjá Jóanes og Sigrid Mortensen í Porkeri, kl. 20.00.
Hesir luttaka við talu, sangi og vitnisburði: Thomas J. Askham, Steindor Hjaltalin, Hans Jacob á Lava, Torbjørn Láadal. Innsavnan til húsið sunnukvøldið. Øll eru vælkomin til møtini.

**Felagið Tórshavn - útferð**
Sunnudagin 11. juni verður gongutúrur: Syðradalur-Blankskála. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 8.30. Túrurin er langur og tungur. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur verður í Vágum (Reynsatindur ella Malinstindur) sunnudagin 11. juni. Vit møtast við kommunuskrivstovuna í Sandavági kl. 14.00. Túrurin er tungur. Ikki neyðugt við tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur:
tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***14. juni verður farið til Klaksvíkar. Úr Steinatúni kl. 13.00. Vitjað verður á spinnaríið hjá Monu (Filana), síðani verður drekkamunnur í Klingruni. Aftur í Havn kl. 17.00. Kostnaður 100,- Gjaldast 12. juni. Tilmelding 316491.***
***Mánadagin 12. juni***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
***Týsdagin 13. juni***
kl. 10-11.30: Sangur. Simme Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 12.00-17.00: Opið hús
***Mikudagin 14. juni***
kl. 10-12.00: Handverk. Vegleiðing er á staðnum
kl. 12.00: Vit eta egnan matpakka
***Tilhaldið stongt kl. 13.00.***
Vitja spinnaríið hjá Monu, Filana, síðani verður drekkamunnur í Kringluni.
***Hósdagin 15. juni***
kl. 10-11.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00: Telduprát. Vegleiðing á staðnum
kl. 14-16.00: Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 16. juni***
kl. 10-17.00: Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
***Týsdag:***
Opið hús. Vit fyrireika útferð o.a.
***Mikudag:***
Kl 15,00-16,00 Syngja vit úr grønu bók.
Kl. 16,00 er filmur - 13. partur av MATADOR
***Hósdag:***
kl. 15,00 Er ættarprát. Vit hyggja eftir myndum frá krígsárunum. Myndirnar eru at síggja í Tilhaldinum.
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv. Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagin 12. juni***
Fimleikur. Felagssangur
***Týsdagin 13. juni***
Opið hús
***Mikudagin 14. juni***
Boccia
***Hósdagin 15. juni***
Opið hús.
***Frá mánadegi 19. juni verður farið í summarfrí. Vit byrja aftur mánadagin 4. september. Gott summar.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 12. juni:***
Upplestur, vit práta og seyma teppir saman.
***Mikudagin 14. juni:***
Vit fara blómutúr. Vit hyggja at og henta blómur at turka. Maja Horn leggur lag á.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið er opið Hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl.
***Mikudag***
Ítriv: silvurarbeiði og annað
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.
Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20. Sunnudag kl. 17.00. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur er hvørt týskvøld kl. 21.00 í Havnaskrivstovuni í Runavík.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Giktafelag Føroya**
**MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13.00 til 16.00.

**Hjartafelagið**
Postboks 3120, 110 Tórshavn
e-mail: hjarta@hjartafelag.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Frítíðarfelagið »Antares«**
*Postsmoga 11, 490 Strendur*
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S.
Meira fæst at vita, við at venda sær til Felagið á tlf. 590100, ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo
Heimasíðan: www.antares.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.